## Mintust Pearl Harbour

Amerikanarar mintust í gjár 68 ára dagin fyri japanska loftálopinum á amerikonsku herflotastøðina Pearl Harbour á Hawaiioyggjunum tann 7. desember í 1941. Japonsku flogførini søktu fleiri herskip, og 2.402 amerikanarar lótu lív í álopinum. Til alla lukku fyri amerikanararnar vóru teir amerikonsku flogberarnir ikki í Pearl Harbour, og tað var ein høvuðsorsøk til, at amerikanski herflotin vann týðandi sigur á japanska herflotanum við oynna Midway longu seks mánaðir aftan á álopið á Pearl Harbour. Í tí bardaganum mistu japanar fýra stórar flogberar, meðan amerikanarar mistu eitt.



## 300 pund av rúsevni

Niðurlendska løgreglan hevur lagt hald á 150 kilo av rúsevninum kokain. Løgreglan kom fram á rúsevnið tann 25. november umborð á einum skjóttgangandi báti, sum var á veg til býin Ghent í Norðurbelgia, men løgreglan vil ikki siga, hvar báturin var, tá hann bleiv steðgaður. Tað er tó komið fram, at báturin var úr einum landi í Suðuramerika, og at hann var serbygdur til at fjala rúsevni. Niðurlendskir fjølmiðlar skriva, at løgreglan hevur tikið seks fólk úr Niðurlondum, Albania og Venesuela í sambandi við málið.

# Fiskavirkið í Gøtu nýggjan Virkisleiðara

**Í virkinum í Gøtu arbeiða 80-90 fólk, og virkið keypir og virkar eini 4.500 tons av ráfiski um árið**

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Janus Rasmussen úr Syðrugøtu er settur í starv sum virkisleiðari á Fiskavirkinum í Gøtu og er júst byrjaður í hesum starvi.

Hann hevur áður arbeitt á virkinum.

Janus var ein av monnunum aftanfyri Faroe Bunkers, sum bygdi upp nýggju tungoljugoymsluna í Fuglafirði. Um hetta mundið var hann eisini stjóri í P/F Bergfrost, sum er frystigoymslan í Fuglafirði.

### Saltfiskur

Á Fiskavirkinum í Gøtu arbeiða eini 80-90 fólk, og virkið keypir og virkar eini 4.500 tons av ráfiski um árið.

Høvuðsfiskasløgini eru longa, brosma og toskur.

Keyparalondini av saltfiskaframleiðsluni úr Gøtu eru serliga Spania og Italia.

Stjórar á Fiskavirkinum eru brøðurnir, Páll og Regin Gregersen.



*Janus Rasmussen hevur áður arbeitt á Fiskavirkinum Gøtu, hevur verið stjóri á P/F Bergfrost, og var við til at byggja upp Faroe Bunkers, sum er tungoljugoymslan í Fuglafirði*




## Partrolarar í Sørvági

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@ssialurin.fo*

Í gjár landaðu partrolararnir Vesturvarði og Vesturskin í Sørvági.

Teir vóru úti í 11 dagar, og veiðan var 230.000 pund av upsa.

Á landingarmiðstøðini í Sørvági siga tey, at fiskurin hjá skipunum var góður, 40 prosent av veiðini var 2-arar og 50 prosent 3-arar, sum er góður fiskur.

Vesturvarði og Vesturskin royndu eystanfyri hendan túrin.

Lítil útróður hevur verið seinastu dagarnar, tí streymurin hevur verið harður og veðurlíkindini vánalig.

Nakrir størri útróðrarbátar, sum royna við línu, plaga at landa veiðina í Sørvági, og veiðan hjá teimum hevur verið góð seinastu tíðina.

Úr Sørvági frættist, at har er lítil útróður við snellu. Dagurin er stuttur, og menn halda, at línuútróðurin sum heild vignast betri hesa myrku tíðina av árinum.

# Pensjónistar okkurt slag av fátækrahjálp

**Pensjónistar í Føroyum vilja hava somu grundupphædd sum í Danmark. Tað siga umboð fyri pensjónistarnar í eini yvirlýsing**

YVIRLÝSING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Pensjónistar mótmæla nú ætlanunum hjá fíggjarmálaráðnum og umboðum fyri politisku flokkarnar, at grundarupphæddin í fólkapensjónini verður niðurlagað og endaliga avtikin, sum tey taka til.

Í eini yvirlýsing siga formenn og nevndarlimir í 15 pensjónistafeløgum kring landið, at bæði sosialt og búskaparliga er fólkapensjónin hin best hugsandi pensjónsskipanin.

Tey leggja aftrat, at verður grundarupphæddin avtikin, fer øll fólkapensjónsskipanin fyri bakka.

- Endin av hesum verður, siga tey, at pensjónistar aftur fara at fáa okkurt slag av fátækrahjálp.

### Sum í Danmark

Tey 15 umboðini fyri pensjónistafeløg í Føroyum, sum øll hava undirskrivað yvirlýsingina, minna á, at partur av blokkinum er ætlaður pensjónistum.

- Í Danmark, haðani blokkurin stavar, rindar tað almenna hvørjum einstøkum donskum pensjónisti 5.254 krónur um mánaðin, og vit krevja, at grundupphæddin í Føroyum kemur upp á sama støði, siga tey í yvirlýsingini frá formansfundi, sum er dagfest í gjár, 7. desember.



*Føroyskir pensjónistar stúra fyri, at teir í framtíðini koma at liva av eini "fátækraløn"*